Bólkur 1:

John Petersen er væl trimmaður

Bæði B36 og KÍ fingu fult á útivølli í uppgerðum, sum boðaðu frá, at nýggja fótbóltsárið er spildurnýtt

LØGMANSSTEYPIÐ
Jóannes Hansen

Tað hevur ikki gingið nakað serligt hjá NSÍ í venjingardystunum. Leygardagin taptu teir aftur, tá ið steypavinnararnir úr B36 eftir 2-1 sigur fóru við øllum úr Runavík. Men NSÍ spælið var væl betri, enn tað hevur verið.

Einstaklingurin, sum skaraði framúr, var John Petersen. Í fjør gekk tað leingi illa hjá B36. Fyrst og fremst tí John ikki var heilt á toppinum og misnýtti nógvar møguleikar. Leygardagin skoraði John bæði B36 málini, men hann vísti eisini, at B36 - eins og í fjør - hevur ilt við at umseta brotsspark til mál. Eftir fyrsta korterið var John eftir sending frá Arnbirni Danielsen leysur og einsamallur við Jens Martini hevði hann ongar trupulleikar at skora. NSÍ vildi hava dómaran at døma fyri rangstøðu, men tað fingu teir ikki viðhald í.

NSÍ hevði meiri trýst og eina rúgvu av hornaspørkum í 1. hálvleiki, men teir fingu einki mál. Eftir frísparksinnlegg stútaði Helgi L. Petersen í kassan, men tá varð dømt fyri rangstøðu.

Eftir steðgin gekk meiri javnt á. Korter undan leikloki setti Óli Hansen høvdið undir hornasparksinnlegg og so var 1-1. NSÍ hevði ikki meiri enn fingið armarnar niðuraftur, tá ið B36 fekk brotsspark, men Jens Martin Knudsen bjargaði skotinum hjá John Petersen. Landsliðsmaðurin treiskaðist, og hann var á blettinum og skoraði sigursmálið, tá ið bólturin eftir skotroynd støkk út frá aftur NSÍ málverjanum.

Eingin ivi er um, at B36 er millum feløgini við størsta fólkagrundarlagnum. Nýggir á liðnum vóru Jóhan Gunnarsson og Levi Hansen, meðan royndir spælarar ikki vóru við - eitt nú Allan Mørkøre, Jens Kristian Hansen, Jens Erik Rasmussen og Klæmint Matras. Hjá NSÍ var Johan Troest Davidsen nýggjur maður.

Nýggjur maður skoraði

Jógvan Norðbúð er nýggjur venjari í Vágum, og hann vildi ikki hava sínar menn at pakka seg saman, tá ið KÍ vitjaði. FS Vágar leyp á, teir komu á odda, og um hepnið hevði verið við teimum, so høvdu teir fingið fleiri mál. Eftir horna úr vinstru, misti KÍ málverjin við nærra stólpan inn um strikuna. Hetta var miðskeiðis í 1. hálvleiki. Frammanundan hevði FSV havt bóltin á stólpanum, og eftir málið var um reppið, at afturlegging endaði við FSV máli, men Aleksandar Djordjevic fekk ruddað burtur.

Í 1. hálvleiki stútaði Stig Edvin Asknes í málið fyri KÍ, men dómarin kollømdi fyri rangstøðu. Undan steðginum javnaði Erling Fles, eftir at Jákup Joensen hevði hálvbjargað, tá ið Niclas Niclassen hevði roynt seg við høvdinum.

Eftir steðgin tóktist sum um heimaliðið ikki heilt megnaði at fylgja við, men tað var ikki fyrrenn í síðstu løtu, at tað var greitt, at KÍ skuldi vinna. Miðskeiðis í 2. hálvleiki stýrdi FSV verjan bóltinum í egið mál, eftir at Atli Danielsen hevði lagt flatt innfyri. Í evstu løtu skoraði unglingaspælarin Julian Samuelsen til 3-1. Hann var júst komin á vøllin, og tað var einasta ferðin, at hann nært bóltin, tá ið eisini innskifti Jacob Bymar hevði spælt upp á tvørs.

NSÍ-B36 1-2 (1-0)

0-1: John Petersen
1-1: Helgi L. Petersen
1-2: John Petersen
NSÍ: Jens Martin Knudsen - Rúni Rasmussen (83: Johan Troest Davidsen), Óli Hansen, Messias Perreira, Sjúrður Jacobsen - Gert Langgaard, Kári Hansen, Justinus R. Hansen (10: Brynjolvur Nielsen), Eddie Mikkelsen (65: Andy Olsen) - Helgi L. Petersen, Dánial Hansen
B36: Tróndur Vatnhamar - Egil Zachariassen, Jóhannis Joensen, Pól Thorsteinsson - Kenneth Jacobsen, Niels Joensen, Ronnie Samuelsen, Jóhan Gunnarsson (Bergur Midjord, 62.) - Bárður Mortansson (Levi Hansen, 85.), John Petersen

FS Vágar-KÍ 1-3 (1-1)

1-0: sjálvmál
1-1: Erling Fles
1-2: sjálvmál
1-3: Julian Samuelsen
FSV:
KÍ: Jákup Mikkelsen - Jan Andreasen, Niclas Niclassen, Aleksandar Djordjevic, Marek Viercbicki - Arnold Joensen (Leon Bjartalíð, 88.), Jan Joensen, Atli Danielsen, Símun Joensen - Erling Fles (Julian Samuelsen, 90.), Stig Edvin Asknes (Jacob Bymar, 70.)

Bólkur 2:

Fuglfirðingar løgdu hart út

Uppflytararnir úr Fuglafirði gjørdu bart, tá ið teir í fyrsta umfari av kappingini um Løgmanssteypið vóru á vitjan hjá bronsuvinnaranum í fjør á Toftum

LØGMANSSTEYPIÐ
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Bólkaspælið í kappingini um Løgmanssteypið fór í gongd í vikuskiftinum, og í bólki 2 vóru tað uppflytararnir úr ÍF, ið fingu bestu byrjanina.

Afturvendir leikarar gjørdust dagsins menn

Á Toftum hevði B68, sum í fjør vann bronsu í landskappingini, vitjan av uppflytarunum úr ÍF. Fuglfirðingar hava undan hesum kappingarárinum fingið tilgongd av fleiri av sínum bygdarmonnum, ið hava leikt við øðrum feløgum seinnu árini, og tað vóru júst tveir av hesum, sum gjørdust dagsins menn.

Teir báðir, Magni á Lakjuni og Bartal Eliasen, myndaðu álopið hjá ÍF í dystinum á Svangaskarði, og báðir vístu teir seg sum nakrar vandamiklar harrar. Toftamenn, ið hava mist fleiri týðandi leikarar undan hesum kappingarárinum, komu ongantið av álvara fyri seg, og eftir at Magni á Lakjuni við tveimum og Bartal Eliasen við einum máli høvdu lagt ÍF á odda 3-0, var dysturin avgjørdur. Mortan Hansen fekk minkað um munin fyri toftamenn, men lítið hjálpti tað, tí Bartal Eliasen var aftur á blettinum og legði fuglfirðingar á odda 4-1. Ungi Hanus Eliasen, ið er yngri bróður sterka verjuleikaran hjá føroyameistarunum HB, Símun Eliasen, vildi eisini sleppa framat, og hann økti um leiðsluna, so at ÍF var á odda 5-1, áðrenn Mortan Hansen enn einaferð fekk minkað um munin fyri B68 til endaligu støðuna 5-2 til ÍF. Við hesum kann ikki annað sigast, enn at fuglfirðingar hava fingið eina flúgvandi byrjan upp á kappingarárið, og sum skilst hevur ÍF eitt rættuliga sterkt lið.

Tryggur sigur til gøtumenn

Á Sevmýri var hin dysturin í bólki 2 leiktur millum TB og GÍ. Munurin millum 1. og 2. deild er stórur, og gøtumenn høvdu allan dystin tamarhald á støðuni, og teir vunnu sannførandi 3-1.

Unga liðið hjá gøtumonnum legði seg á odda 3-0 við málum frá Leivi Hansen, Símun Jacobsen og landsliðsleikaranum Súna Olsen, áðrenn TB móti endanum fekk minkað um munin við brotsparki, sum Einar Petersen setti í netið til endaligu støðuna 3-1 til GÍ.

Bólkur 2:

TB-GÍ 1-3
0-1 Leivur Hansen
0-2 Símun Jacobsen
0-3 Súni Olsen
1-3 Einar Petersen brts.

B68-ÍF 2-5
0-1 Magni á Lakjuni
0-2 Magni á Lakjuni
0-3 Bartal Eliasen
1-3 Mortan Hansen
1-4 Bartal Eliasen
1-5 Hanus Eliasen
2-5 Mortan Hansen

Púra opið í toppinum

Eftir tvey tey fyrstu umførini síðani vetrarsteðgin er holið, sum var millum tey bæði toppliðini og FCK, burtur

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Tað, sum í vetur hevur verið mett í vár at skula gerast tvíkapping um DM millum Brøndby og Esbjerg, er eftir tvey tey fyrstu umførini síðani vetrarsteðgin vorðin til viðopna kapping, har eisini føroysku feløgini, FCK og OB, og kanska onkur annar eisini eru uppií.

Brøndby hevur tapt tvær ferðir. Esbjerg hevur vunnið eina ferð og eina ferð spælt javnt, og FCK og OB hava vunnið tvær ferðir í part.

Danir eru meiri áhugaðir í heimligu landskappingini, enn teir hava verið seinastu hálvu øldina. Tað sæst aftur í áskoðaratølunum. Mest áhugaverda uppgerðin hesa ferð var leygardagin í Odense, har Jákup á Borg framvegis bíðar eftir at sleppa upp í part á besta liðnum. Á útseldum stadion vann heimaliðið 1-0 ímóti Brøndby. Michael Laudrup ásannaði, at nú er tað rættuliga álvarsamt hjá hansara liði, sum tað er neyðugt at vinna hjá næstu ferð, teir skulu í eldin. Tá er avbjóðingin ikki heilt so stór, sum hon hevur verið ímóti Esbjerg og OB. Brøndby skal spæla á heimavølli ímóti FC Nordsjælland.

Esbjerg var á heimavølli frammanfyri átta túsund áskoðarum, sum alla tíðina sótu á nálum, annar partur in av rættuliga dramatiskari og málríkari uppgerð. AGF var í ein tíma frammanfyri 1-0. So var Esbjerg á odda 2-1 og 3-2, men AGF, sum svenski venjarin sigst hava syrgt fyri at fáa at vera kropsliga rættuliga væl fyri, kom báðu ferðirnar afturíaftur, og so endaði tað 3-3!

Hjá FCK, sum framvegis ikki hevur pláss fyri Toda Jónsson, tók tað sína tíð, men tað eydnaðist kortini frammanfyri 21.975 áskoðarum at fáa bilbukt við FC Midtjylland. Sigursmálið til 2-1 skoraði 20 ára gamli Martin Bergvold, sum var settur inn á miðvøllin eftir steðgin. Hetta var fyrsta málið, sum ungi maðurin hevur skorað í superliguni. FCM var komið framum í 1. hálvleiki, og eftir steðgin hevði Álvaro Santos við rimmar langskoti javnað til 1-1. Álvaro hevði fleiri góðar møguleikar, sum hann misnýtti. Saman við honum í FCK álopinum var Zuma, sum framvegis ikki hevur skorað í landskappingini í vár. Peter Møller loysti hann av síðstu løtuna.

Í botninum kom tað væl við hjá Frem, at tað eydnaðist teimum at vinna 1-0 í Herfølge. Teir fingu málið við brossparki. Verri gekk tað hjá illa sperda AB. Á útivøll í Farum taptu teir 1-0, og nú sær rættuliga svart út hjá akademikarunum.

AaB tykist ota seg alt nærri toppinum. Hesa ferð sendu teir frammanfyri átta túsund áskoðarum Viborg til hús við 2-0 tapi. Í átta venjingardystum og tveimum landskappingardystum í vár hevur AaB ongantíð tapt.

At tað gongst væl hjá FCK, OB, Esbjerg og AaB, og at AGF tykist hava rætta kós ber við sær, at áskoðarafjøldirnar eru so stórar. Tað er fjøldin eisini í Brøndby, har áhugin altíð er stórur. Eisini tá ið tað ikki hilnast so væl hjá Brøndby. Men teir munnu ivaleyst fara at koma afturíaftur.

Undir øllum umstøðum er lagt upp til sera spennandi og langan slutspurt í superliguni. Sæð her norðan úr Atlantshavinum er spurningurin, nær tað fer at verða pláss fyri Jákupi á Borg og Toda Jónsson í dansku kappingini.

Kvinnurnar klárar til Italia

Landsliðsvenjararnir í hondbólti hava nú gjørt av, hvørjar tær 16 verða, sum skulu við landsliðnum til Challenge-Cup kapping-ina um góðan mánad

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Eitt í føroyskum høpi spildurnýtt navn, nakrar av teimum, sum áður hava sett dám á kappingina og so tær bestu av heimligu leikarunum.

Tað er samansetingin, sum teir báðir, Svein Rógvi Nielsen og Flemming Raben hava valt sær, nú kvinnulandsliðið í hondbólti av álvara skal sleppa at royna seg.

Hetta verður í sonevndu Challenge-Trophy kappingini, sum í ár verður hildin í Italia í døgunum, 27. apríl til 3. mai

Nøvnini

Spildurnýggja navnið í hesum høpinum er Ann Mari Káradóttir. Hon er ikki feskari enn so, at hon hevur verið við til at vunnið fleiri FM-heiti í yngru deildunum hjá VÍF, og verður so lagt afturat, at ættarnavnið upprunaliga er Durhuus, so eigur tað ikki at taka nakran á bóli, at hondbóltsevnini eru sjónsk.

Tær sum nú royna seg uttan fyri føroysku landoddarnar, eru Katrin á Neystabø og Gunnleyg Berg, sum báðar hava eina fortíð í Neistanum. Tær báðar hava, síðani tær fyri tveimum árum síðani fóru til Danmarkar at lesa, gjørt nógv við hondbóltin, og einki er at ivast í, at venjingarstøðan er fult á hædd við tí hjá liðfeløgunum heima í Føroyum.

Samlaði hópurin, sum undan ferðini til Italia ætlandi skal á venjingarlegu í Italia, er hesin:

Málverjar: Helena Dam Poulsen, Tomma Petersen og Friða Petersen
Útileikarar: Nicolina Eyðbjørnsdóttir, Anna Kristina Samson, Ann Mari Káradóttir, Katrin á Neystabø, Annika Ljósstein, Joan M. Djordjevic, Sóley Mikkelsen, Gurið Mortensen, Bára Skaale Klakstein, Liv Sørensen, Una Olsen, Gunnleyg Berg og Marjun Tróndarson.

Venjarar eru sum sagt Svein Rógvi Nielsen & Flemming Raben

Hondbóltsstøður

1. Deild kvinnur

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Stjørnan	10	9	-	0	-	1	604	434	170	29
2 VB	10	10	-	0	-	0	632	457	175	28
3 VÍF	10	6	-	0	-	4	576	477	99	21
4 Neistin	10	5	-	0	-	5	553	522	31	18
5 StÍF	11	2	-	0	-	9	524	642	-118	9
6 Søljan	11	3	-	0	-	8	437	563	-126	8
7 Kyndil	10	1	-	0	-	9	359	590	-231	3

1. Deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Neistin	8	6	-	0	-	2	516	477	39	18
2 Kyndil	8	4	-	1	-	3	538	503	35	18
3 VÍF	8	5	-	0	-	3	511	461	50	16
4 StÍF	8	3	-	0	-	5	470	452	18	13
5 H71	8	3	-	1	-	4	453	515	-62	9
6 KÍF	8	2	-	0	-	6	489	569	-80	7

Flogbóltsstøður

Meistaradeild, kvinnur

	d	v	-	t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1 Mjølnir	20	17	-	3	54	16	38	26
2 TB	20	16	-	4	53	15	38	24
3 Dráttur	20	11	-	9	40	33	7	18
4 ÍF	20	8	-	12	28	39	-11	12
5 KÍF	20	7	-	13	25	50	-25	9
6 Fleyr	20	1	-	19	12	59	-47	1

Meistaradeild, menn

	d	v	-	t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1 Mjølnir	16	15	-	1	45	10	35	23
2 ÍF	16	13	-	3	42	12	30	19
3 SÍ	16	8	-	8	30	28	2	12
4 Fram	16	3	-	13	13	41	-28	4
5 Fleyr	16	1	-	15	7	46	-39	2

Sosialurin hevur fingið nýtt telefonnummar
tel 34 18 00
fax 34 18 01
heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo

Danska superligan

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Esbjerg	22	14	-	5	-	3	48	25	23	47
2 Brøndby (S)	22	14	-	4	-	4	36	21	15	46
3 FCK (M)	22	13	-	6	-	3	35	18	17	45
4 OB	22	12	-	5	-	5	46	30	16	41
5 AaB	22	10	-	6	-	6	33	27	6	36
6 AGF	22	8	-	3	-	11	34	45	-11	27
7 FCM	22	7	-	5	-	10	36	37	-1	26
8 Viborg	22	6	-	7	-	9	31	31	0	25
9 Herfølge	22	6	-	5	-	11	23	30	-7	23
10 FC Nordsj.	22	5	-	7	-	10	26	38	-12	22
11 Frem	22	5	-	3	-	14	24	41	-17	18
12 AB	22	3	-	2	-	17	18	47	-29	11

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jákup á Borg (OB)

Danska 1. deild

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 AC Horsens	16	14	-	1	-	1	33	9	24	43
2 Randers FC	16	10	-	2	-	4	41	26	15	32
3 Silkeborg	15	9	-	4	-	2	33	13	20	31
4 Køge	16	8	-	4	-	4	28	22	6	28
5 HFK Sønderj.	15	8	-	3	-	4	40	21	19	27
6 Skjold	16	8	-	2	-	6	36	30	6	26
7 FC Nordj.	15	7	-	3	-	5	17	17	0	24
8 Fredericia	15	7	-	2	-	6	23	24	-1	23
9 Ølstykke	15	7	-	1	-	7	34	30	4	22
10 Nykøbing	15	5	-	3	-	7	24	27	-3	18
11 B 93	15	4	-	4	-	7	24	27	-3	16
12 Vejle	16	4	-	3	-	9	23	34	-11	15
13 Fremad Am.	16	3	-	5	-	8	22	30	-8	14
14 FC Aarhus	16	4	-	1	-	11	18	40	-22	13
15 Brønshøj	16	3	-	2	-	11	19	43	-24	11
16 B 1913	16	1	-	4	-	11	12	37	-25	7

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen, Ian Højgaard (Vejle), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

Danska 2. deild

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Næstved	16	11	-	2	-	3	38	14	24	35
2 Dalum	16	9	-	3	-	4	39	26	13	30
3 Holbæk	16	8	-	4	-	4	30	24	6	28
4 HIK	16	8	-	4	-	4	29	24	5	28
5 B1909	16	7	-	3	-	6	33	26	7	24
6 Brabrand	16	6	-	5	-	5	30	22	8	23
7 Jetsmark	16	6	-	5	-	5	27	28	-1	23
8 Kalundborg	16	6	-	4	-	6	38	36	2	22
9 Slagelse	16	6	-	3	-	7	26	25	1	21
10 Lyngby	16	5	-	6	-	5	25	26	-1	21
11 Kolding FC	16	6	-	3	-	7	24	26	-2	21
12 Glostrup	16	6	-	2	-	8	28	32	-4	20
13 Holstebro	16	5	-	3	-	8	27	32	-5	18
14 Skive	16	4	-	3	-	9	29	36	-7	15
15 Hjørring	16	4	-	2	-	10	21	50	-29	14
16 Hvidovre	16	3	-	4	-	9	19	36	-17	13

StÍF-VB 19-49 (10-24)

VB til reiðar

VB hitaði upp til brakið, tá tær leygardagin vundu burturúr einum tannleysum StÍF liði

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Har var eingin sum helst ivi, tá kvinnuliðið hjá VB leygardagin vitjaði á Skála.

49 mál til eitt og sama liðið er so í øllum førum ikki nakað, sum er gerandiskostur í føroyskum hondbólti, og leitast skal helst langt aftur í søgubøkurnar, um eitt slíkt tal skal finnast. Um tað yvir høvur finst innan kvinnuhondbóltin.

Mistu ikki ferðina

VB boðaði beinan vegin frá, at tær ætlaðu sær so ikki at snáva, og tá talvan eftir fyrstu 20 minuttirnar vísti 16-6, var sigurin sum so longu vísur.

Men í mun til so nógvar aðrar dystir av hesum slagnum, so høvdu VB-kvinnurar als ongan hug at seta ferðina niður. Hóast leiðslan var so ríkiliga stór, at StÍF onga vón hevði um at gera nakað sum helst, so helt liðið alla tíðina á við ágangandi spælinum. Ikki minst í verjuni, har hópur av skjótálopum vórðu fingin til vega. Máltalvan í høllini gekk stútt uppeftir, og móti endanum var størsti spurningurin helst, hvørt hon skuldi tey hálvt-hundrað ella ikki.

Tað gjørdi hon so ikki, men við 49 málum markeraði VB í øllum førum, at tær eru til reiðar at spæla oddadyst komandi vikuskifti. Ein oddadyst, sum eftir øllum sólarmerkjum at døma ger av, hvørt tað verða VB ella Stjørnan, sum kunnu rópa seg meistarar, tá heiðursmerkini skulu býtast um knappar tvær vikur.

Dysturin í tølum

StÍF-VB 19-49 (10-24)
Málskjúttar
StÍF: Melica Ergic 7(2), Paula B. Høgnesen 5(1), Poula D. Olsen 3, Sunfríð B. Jacobsen 2(1), Ann Mari Østerø 1, Anna B. Danielsen 1
VB: Rannvá Augustinussen 10, Gurið Mortensen 10, Aukse Vysniaskaite 9, Daiva Toumaite 7(1), Leila Jespersen 7, Eydis Kjærbo 3, Rakul Olsen 1, Margreth Augustinussen 1, Eyðbritt Krosslá 1
Brotskøst: StÍF 7, VB 2
Útvísingar: StÍF 4
Dómarar úr Kyndli: Geir Wardum & Gunnar Gregoriussen

Máltindarnir

Kvinnur			
Simona Dziugyte	Neistin	189	(39)
Aukse Vysniaskaite	VB	166	(44)
Nicoleta Radu	Søljan	162	(38)
Ioana Rápa	VÍF	142	(35)
Daiva Tuomaite	VB	137	(17)
Gurið Mortensen	VB	127	(6)
Melica Ergic	StÍF	125	(17)
Katarina Stepanov	Stjørnan	114	(20)
Sóley Mikkelsen	VÍF	113	(22)
Joan M. Djordjevic	Stjørnan	106	(44)
Irina Radovici	VÍF	96	
Heidi Maria Akselsen	Søljan	96	(9)
Poula D. Olsen	StÍF	91	
Nikolina Eyðbjørnsdóttir	VÍF	91	
Lina Andriulyte	Neistin	90	
Menn			
Dragisa Stojovic	Neistin	118	(3)
Damir Oros	KÍF	117	(36)
Halgir D. Olesen	H71	116	(9)
Blagoje Buha	Neistin	109	(24)
Hans Áki Dal-Christiansen	Kyndil	109	(38)
Áki Mørk	Neistin	97	(20)
Henrik Gerster	H71	95	(32)
Ingi Olsen	VÍF	92	(23)
Alexandur Johansen	StÍF	88	(30)
Petur Martin Poulsen	KÍF	87	
Jacob Jónsson	Kyndil	84	
Regin Petersen	KÍF	81	(1)
Høgni Klein	Kyndil	78	(2)
Gert Hansen	KÍF	78	(3)
Agnar Joensen	VÍF	77	(10)